Sundamaður:

# Skipari á norskum línubáti undir Føroyum



*Gundur Sørensen kemur ikki aftur úr Noregi í bræði. Hann hevur konu og børn har yviri*

*Mynd: Jens K. Vang*

**- Hevði ikki droymt um, at eg skuldi enda sum skipari á einum norskum línubáti undir Føroyum, tá eg fór yvir fyri sjey árum síðan, sigur Gundur Sørensen, ættaður úr Hvannasundi sum er skipari á Fernando, íð lá á Havnini sunnudagin**

FISKIVINNA
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Í krókinum uttanfyri Bursatanga liggur norski línubáturin Fernando og dregur aftur og fram í súginum. Tað er sunnudagur og Grækarismessuhald longur uppi í býnum. Dukini frá stórtrummuni úr hornorkestrinum hava hug at køva kalda landnyrðingin, sum ýlir í mastratoppunum og parabolantennuni umborð.

Norskur línubátur á Havnini ein ikki óvanlig sjón, men at føroyingur er skipari, tað er ikki heilt vanligt.

- Vit komu inn, tí okkurt var í ólagi við einum plátufrystara, sigur Gundur Sørensen, ein ungur sundamaður, meðan hann situr og førir inn á telduna hvussu nógvan pening manningin skal hava, nú teir ætla sær ein túr í land. Alt er stongt hendan sunnudag, men Café Natúr liggur skamt í frá, so kanska teir ganga ein túr niðan.

- At eg gjørdist norskur fiskimaður byrjaði fyri sjey árum síðan, sigur Gundur Sørensen. Hann er sonur Trónd Sørensen og abbasonur Guttorm Sørensen, vanliga nevndur Gutti í Innistovu í Hvannasundi.

- Eg hevði einki at takast við og kendi nakrar sundamenn, sum vóru við línubátum í Måløy í Noregi. Millum annað brøðurnir Jákup og Erland Joensen og so vóru aðrir eisini. Eg setti meg at hyggja í Norsk Illustreret Skibsliste og fann eitt skip, sum hoyrdi heima har teir sigldu. Eg ringdi beinanvegin og fekk kjans. Alt var leyst og liðugt beinanvegin. Eg ringdi ein fríggjadag og leygardagin var eg umborð á Måløy Fisk, sigur Gundur Sørensen.

## Fór á norskan skúla

- Tá eg hevði verið nakað við Måløy, fór eg heim aftur, og ætlaði ikki yvir aftur. Men so fekk eg ein nýggjan kjans við einum línubáti, íð nevndist Kamaro og har sigldi eg sum dekkari, til eg fór at skiparaskúla í 1998. Eg fór á skúla í Måløy og kann í dag føra skip upp til 500 tons, tað er tað vit fyrr kallaðu sætteskipper. Tá eg var liðugur við skúlan, fekk eg stýrimannskjans við Kamaro, sigur Gundur Sørensen.

- Hetta er fyrsti túrurin hjá mær undir Føroyum. Vit hava bert roynt í fimm dagar og tað hevur viðrað illa, men fiskiskapurin hevur slett ikki verið so galin. Vit hava eini 12 tons av avhøvdaðari longu og brosmu inni. Vit frysta umborð, sigur hann.

- Vit hava roynt sunnan fyri Føroyabanka. Bátarnir royna eisini í kantinum á Munkagrunninum og Suðuroyarbankanum og á Rygginum,

## Gulltúrur

Norðmenninir eru spentir upp á fyrsta túrin eftir nýggjár undir Føroyum, tí hesin plagar at geva nógv.

- Síðsta túr, ella fyrsta túr í ár, fingu teir 143 tons av frystari longu og brosmu og teir seldu fyri tríggjar milliónir. Manningarparturin fyri hendan túrin var 110.000 krónur. Eini 60-70 prosent av veiðuni er longa og longa hevur góðan prís í Noregi. Vit fáa 26 krónur fyri kilo og 18 krónur fyri kilo av brosmu. 30 prosent av veiðuni hvønn dag kann vera toskur, men vit fáa ikki meira enn 15-20 prosent, tí vit royna so djúpt, sigur Gundur Sørensen.

- Annars eru treytirnar nokk so strangar hjá norðmonnum at royna undir Føroyum. Tað mugu ikki vera fleiri enn 12 línubátar í senn undir Føroyum, so tú kann ætla at kappingin er stór um at sleppa í føroyskan sjógv. Norðmenn rokna havið kring Føroyar sum sera góð fiskileið. Vit skulu boða frá, tá vit koma í føroyskan sjógv og tá vit fara úr føroyskum sjógvi. Eisini skulu vit boða frá hvønn morgun klokkan sjey meðan vit fiska hvussu gingist hevur seinastu 24 tímarnar, sigur hann.

## Friðaligt á feltinum

Síðan fartelefonirnar eru komnar umborð á skip er friðaligt á feltinum.

- Menn tosa næstan ikki longur yvir VHF ella sendarar. Men eg havi sjálvur roynt nógv undir Føroyum, so eg kenni føroyingarnar. Eitt tað fyrsta eg gjørdi, tá eg kom í føroyskan sjógv var at kalla á vinmannin Líggjas Johannsen sum er skipari á einum føroyskum línubáti og eg havi tosað við aðrar eisini, sigur hann.

Gundur fór sum 14 ára gamal fyrstu ferð til skips. Tað var við Pison.

- Eg tímdi slett ikki at ganga fólkaskúlan á tamp. Eg fór tann eina dagin til Alex Sólstein, skúlastjóra, legði bøkurnar á borðið og segði, at nú tímdi eg ikki meira, eg vildi sleppa til skips. Síðan havi eg siglt. Fyrst við Pison, síðan Kletti, trý ár við Tjaldrinum og við Klakki beint áðrenn eg fór til Noregs, sigur Gundur Sørensen.

Og áðrenn hann fór til skips róði hann út.

- So ringur var eg av sjóverki tann eina túrin eg var á útróðri við Richard Johannesen, at eg minnist at eg sá kirkjuna, tá vit fóru og tá eg vaknaði aftur var kirkjan tað fyrsta eg sá. Nú bilar ikki sjóverkurin, sigur Gundur.

## Leingi burtur

Túrarnir undir Føroyum hjá norsku bátunum plaga at vara í sjey vikur. Gundur ivast í, um tað hevði borið til at fingið føroyingar at ligið heilar sjey vikur undir Føroyum uttan at fara inn.

- Tað er ørvísi hjá okkum, vit eru langt burtur heiman og tað er tað sama hjá okkum sum hjá føroyingum fyrr, tá teir royndu á Flemmish Cap við línu. Tá vit eru komnir á fiskileið, so vita vit, at vit skulu vera her í sjey vikur, og so er ikki meira at gera við tað, sigur Gundur og hyggur upp á klokkuna í messuni. Hon vísir norska tíð, ein tíma framman fyri føroysku.

- Jú, vit nýta norska tíð undir Føroyum. Men her er eisini alt norskt. Eg flyti neyvan heim aftur í bræði. Eg havi familju í Noregi, konu og trý børn, so tað skal nokk ein stórur oljukekkur til at fáa meg heim aftur. Eg havi eisini júst bygt beint uttanfyri Måløy, á einum staðið íð nevnist Raudberg, sum er tað sama sum Reyðberg í Føroyum, sigur hann.

## Parabol

Sjónvarpið er so høgt skattað umborð á norskum línubátum í dag, at tað stendur við síðuna av plottaranum á brúnni.

- Eg havi so nógvar kanalir sum eg orki at hyggja eftir og enntá eisini digitalar, so eg kann hyggja eftir filmi á vaktunum, sigur Gundur og niðri í messuni situr manningin og hyggjur eftir norskum sjónvarpi. Ein íslendingur er eisini við og um hann kann síggja íslendskt sjónvarp, meldar søgan einki um.

- Vit fara at royna undir Føroyum til út á summarið. Vit eiga eisini kvotu í Finnmørkini, men vit royna at goyma hesa til so langt út á heystið sum møguligt, sigur hann.

Gogga finnst ikki umborð, men teir nýta makrel, høgguslokk og sild sum agn.

- Sild er óføra gott longuagn. Tað fiskar kanska ikki so leingi og fer illa av, men hon tekur væl í tað sum kemur niður, sigur Gundur.

## Skipaði viðurskiftir

Dekkararnir umborð á norskum skipum fáa 3000 krónur 14. hvønn dag í minstu løn. Yvirmenninir, tað er skipari, stýrimenn, maskinmenn og kokkur fáa fasta mánaðarløn alt árið og síðan fáa teir bonus av veiðuni. Dekkararnir fáa eisini bonus. Gundur vil ikki upplýsa hvussu stór mánaðarlønin er hjá yvirmonnunum.

- Okkurt má man hava privat, sigur hann skemtandi.



*Messuprát við Gundur úr Hvannasundi, skipara*

*Mynd: Jens K. Vang*

Vit

tosa

vinnumál

flótandi.

*Heilsan,*

*vinnulívsdeildirnar*

FØROYA BANKI